# Børnini spældu fyri fullum húsum

**Barnasjónleikarastevnan var í Havn um vikuskiftið, og hon eydnaðist serstakliga væl, siga fyrireikararnir. Allar tær 11 sýningarnar vóru stak væl vitjaðar**

BARNASJÓNLEIKARA-STEVNA
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*



*Seinasti leikurin leygardagin var "kuffertið", sum børn úr Dramaverkstaðnum framførdu í Grasagarði. Sum sæst á myndini var heilt nógv fólk og hugda at leikinum.*

*Mynd: Terji Nielsen*

Eini 150 børn tóku lut í barnasjónleikarastevnuni. Ikki færri enn 11 leikir vóru framførdir, og framførslurnar vóru bæði innandura og uttandura. Børnini løgdu til brots leygarmorgunin klokkan níggju, og síðsti leikurin var ikki liðugur fyrr enn um klokkan trý seinnapartin leygardagin.

### Vaksandi áhugi

Birita Mohr hjá MÁF sigur, at sjónleikarastevnan eydnaðist serstakliga væl. Tað hevði nógv at siga, at veðrið var til vildar, tí um tað regnaði, hevði tað ikki hepnast so væl við útileikunum. Men júst tær løtur, tá ið útileikir vóru á skránni, var veðrið til vildar, og sólin kagaði fram, greiðir Birita Mohr frá.

Eitt av endamálunum við barnasjónleikarastevnuni er at fáa sjónleik til at verða ein partur av undirvísingini í fólkaskúlanum. Undan stevnuni var skriv sent út til allar skúlar í Føroyum, har teir vóru bjóðaðir til at taka lut í stevnuni. Tíverri var áhugin ikki so stórur, tí einans tríggir skúlar vóru umboðaðir. Børn úr skúlanum í Nólsoy framførdu ein leik, ein bólkur úr Kommunuskúlanum í Havn framførdi ein leik, og eisini var ein framførsla hjá børnum í Rituvíkar skúla.

Birita Mohr sigur, at tað vísir seg at verða ógvuliga trupult at fáa skúlarnar at nýta sjónleik í undirvísingini. MÁF hevur bjóðað seg fram til at hjálpa til við undirvísingini, men hesum hava myndugleikarnir takkað nei til.

Hinvegin kunnu tey í MÁF fegnast um, at tað er ein vaksandi áhugi millum børn fyri at spæla sjónleik. Av teimum ellivu leikunum, ið vóru framførdir á stevnuni leygardagin, vóru teir átta framførdir av næmingum á ávíkavist Sjónleikaskúlanum í Sjónleikarahúsinum og Dramaverkstaðnum hjá Hjørdis Johansen.

– Tað er stórur áhugi millum børn fyri at spæla sjónleik, og tað er langur bíðilisti at sleppa at ganga á báðum skúlunum, sigur Birita Mohr, sum heldur, at framtíðin hjá sjónleikinum í Føroyum sær bjørt út.

### Høvdu sjálv bæði skrivað og sett upp

Næmingarnir á sjónleikaskúlunum fáast ikki bert við at spæla sjónleik. Ein stórur partur av undirvísingini snýr seg eisini um at gera leikir, t.v.s. bæði at skriva leikir, seta upp og gera búnar. Hetta hava børnini eisini gjørt, og tí vóru fleiri av leikunum, ið vóru framførdir leygardagin, skrivaðir av næmingunum sjálvum. Eisini hevði onkur næmingur eisini sjálvur smíðað ein sang til onkran av leikunum.

Barnasjónleikarastevnan er á skránni annaðhvørt ár.



*Í sambandi við allar framførslurnar vitjaði hesin klovnurin tey støð, har framførslan var.*
*Mynd: Terji Nielsen*

### Fólk grótu illa

Konsertin við Eivør Pálsdóttir, Guðrun Sólju Jacobsen og Lenu Andersen í Keypmannahavn í vikuskiftinum var stak væleydnað.

Tá tær tríggjar havfrýrnar endaðu konsertina, við saman at syngja Blómuna hjá Poul F. Joensen og Hanus Johansen, grótu fólk í salinum. Vakurleikin var so fullkomin.

Guðrun legði fyri við at spæla eitt akkustiskt sett, síðan spældi Eivør eitt akkustiskt sett og áðrenn fari varð til hálvleik, spældi Lena somuleiðis akkustiskt.

Tá steðgurin var av, spældu songkvinnurnar aftur í somu raðfylgju, men hesa ferð við ravmagnsljóði.

Tá Lena endaði sín part, komu Guðrun og Eivør eisini á pallin, og saman sungu tær um blómuna hjá Poul F. Joensen.

**nud**

### Koyrdi ov skjótt, fullur og uttan koyrikort

Klokkan hálvgum trý leygarnáttina tók løgreglan í Havn ein mann fyri at koyra ov skjótt. Ferðin var so høg, at koyrikortið hevði rokið. Hann hevði tó einki koyrikort, og var harumframt ávirkaður av rúsdrekka.

**-nud**

### Rendi á ein garð

Eitt lítið ferðsluóhapp hendi í Havn fríggjakvøldið við Landavegin og Fr. Petersensgøtu, tá ein bilur rendi á en vegg. Bilurin fór nakað, men eingin mannaskaðið stóðst av óhappinum. Hvørki rúsdrekka ella ferð var orsøkin.

**-nud**

### 10 koyrdu uttan belti

Í Vágsbotni kannaði løgreglan fyri trygdarbelti. Kanning varaði í ein tíma og 14 fólk fingu bót. 10 fyri ikki at koyra við trygdarbelti, onkur tosaði í fartelefon og onkur hevði lyktafeil.

**-nud**

### Klagaðu um harðan tónleik

Stutt eftir kl. 23.00 fríggjakvøldið varð klaga um harðan tónleik í miðbýnum í Havn. Men tað varð Mentanarnátt og neyðugu loyvini vóru til tiltakið. Tónleikurin steðgaði á midnátt, so løgreglan gjørdi ikki stórvegis við málið.

**-nud**

# Mýlingur seldur til Onglands

**Ísfiskatrolarin Mýlingur, sum 2. hvítusunnumorgun varð ásigldur av grønlendska rækjutrolaranum Salleq, er ikki longur í føroyska flotanum**

*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*

Skipið er selt til spaniumenn, men verður skrásett í Onglandi. Mýlingur fór av Havnini klokkan 20.00 fríggjakvøldið á veg til Spania á skipasmiðju við trimum føroyingum umborð.

### Verður umvælt í Spania

Holið á skrokkinum á skipinum er tett á Skipasmiðjuni í Havn, og nú verður skipið umvælt í Spania. Seinni fer Mýlingur til fiskiskap í enskum sjógvi.

Keypararnir eru teir somu, sum ætlaðu at keypa Mýling, áðrenn hann varð ásilgdur. Teir vóru á veg til Føroyar at avgreiða søluna, tá óhappið hendi.

Tað er meklarafyritøkan MARETEC á Argjum, sum hevur staðið fyri søluni.

Aksel Hansen útgerðarmaður hjá P/F Kimbil sigur, at felagið leitar eftir einum hóskandi skipi at avloysa Mýling.

Felagið eigur frammanundan loyvið hjá Strembingi, og ætlanin er at leggja hetta loyvið saman við loyvinum hjá Mýlingi. So nú verður leitað eftir einum skipi, sum passar í støðd og maskinkraft, at røkja samanlagda loyvi.

Aksel Hansen sigur, at teir ongar ætlanir hava um at gevast, hóast útlitini hjá fiskivinnuni eru døpur í hesum døgum. Aksel Hansen vil ikki siga tann nágreiniliga søluprísin fyri Mýling, men sigur, at felagið er komið hampiliga væl burturúr hesum.